## Rás2 sendir av Fjørukrónni í Vestmanna

Hetta vikuskiftið bjóða vestmenningar til Fjarðastevnu, og hetta er ein hending, sum fólkini á Rás2 ikki lata fara aftur við borðinum. Tey fara nevniliga at senda rættiliga nógv úr Vestmanna, eins og gjørt hevur verið við hinar summarstevnurnar. Sambært skránni hjá rásini byrja sendingarnar longu hósmorgunin kl. 9:05 og hildið verður á til middags og síðani aftur frá kl. 13 til 15. Fríggjadagin byrja sendingarnar eisini kl. 9:05 og halda fram til middags. Síðani verður ein steðgur fram til kl. 17:15, tá sent verður nærum óbrotið heilt til kl. 21.



# Løgmaður provokerar arbeiðsfólk á flakavirkjum

**Fakfeløgini eru í øðini av fráboðanini hjá løgmanni um, at nú skulu skip sleppa at avreiða uttanlands sum tey vilja, og tey fara nú at viðgera støðuna. Løgmaður stúrir ikki fyri, at óvirkaður fiskur fer at floyma av landinum**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ingeborg Vinther følir seg provokeraðan av fráboðanini hjá løgmanni, men løgmaður dugir ikki at síggja nakran vanda*

- Tað er ein stór provokatión ímóti fakfeløgunum, tá ið løgmaður nú sigur, at samgongan umhugsar at avtaka forboðið hjá føroyskum at avreiða uttanlands.

Tað sigur Ingeborg Vinther, forkvinna á Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sigur, at fakfeløgini stríddust í fleiri ár fyri at tryggja, at fiskur, sum føroysk skip fiskaðu undir Føroyum, eisini skuldi koma til virkingar á landi í Føroyum.

Tað gjørdu feløgini, tí tað kom alt ov ofta fyri, at skipini í stóran mun sigldu beinleiðis uttanlands við fiskinum.

- Tað kostaði nógv arbeiðspláss á landi og tí stríddust fakfeløgini fyri at tryggja, at fiskurin, sum varð fiskaður undir Føroyum, eisini kom til virkingar í Føroyum.

Ingeborg Vinther sigur, at tað var eitt stríð, sum tók fleiri ár, men at enda var tann regla sett í gildið, at skipini kunnu í mesta lagi avreiða 25% av fiskinum uttanlands.

Tí hava fakfeløgini tikið løgmanni tað ógvuliga illa upp, tá ið hann nú sigur, at samgongan fer at umhugsa at avtaka forboðið aftur.

Tað er fyri at hjálpa fiskivinnuni ígjøgnum kreppuna, at samgongan nú umhugsar at avtaka forboðið ímóti at avreiða uttanlands.

Samgongan heldur framvegis fast um, at almennur stuðul kemur ikki upp á tal fyri at hjálpa fiskiflotanum burturúr oljukreppuni, men hinvegin er samgongan sinnað at avtaka lógarásettar forðingar fyri at geva fiskiflotanum fríari ræsir at virka og sostatt geva honum betri møguleikar at klára seg.

### Ogn Føroya fólks

Ingeborg Vinther sigur, at tað er beinleiðis ásett í lógini, at fiskiríkidømið undir Føroyum fólksins ogn og sostatt eru tað ikki bara nakrir fáir reiðarar, sum hava ognarrættin til tað.

- At fiskurin er ogn Føroya Fólks, merkir eisini, at fiskurin skal á land í Føroyum til virkingar, so at eisini fólk á landi fáa ágóðan av tí.

- At flyta fiskin óvirkaðan av landinum setir Føroyar í somu støðu sum menningarlondini, sum bara útflyta sína rávøru, tí tey hava ongan ídnað sjálvi.

Ingeborg Vinther sigur, at hetta er púra skeivur politikkur og er ein avleiðing av, at politiski myndugleikin hevur ikki megnað at finna nakrar loysnir fyri fiskivinnuna.

Fakfeløgini vísa eisini á, at tann støða, at fiskiskapurin er minkaður so nógv, er ein avleiðing av beinleiðis politiskari vanstýring, tí teir hava ikki megnað at ført ein fiskivinnupolitikk, sum hevur tað neyðugu stovnsrøktina við sær.

Men ístaðin fyri at taka hond um tann trupulleikan, er loysnin hjá samgonguni at føra fiskin óvirkaðan av landinum.

Ingeborg Vinther sigur, at avleiðingin av hesum verður, at fiskurin fer óvirkaður av landinum og virkini koma at standa tóm.

- Eg dugi heldur ikki at síggja, hvussu hetta skal fáa fiskaprísin upp og oljuprísin niður.

Hon sigur, at fakfeløgini taka hetta í størsta álvara og tey trý feløgini í Samtaki, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Fiskimannafelag, fara at viðgera støðuna ein av næstu døgunum at tosa um støðuna.

### Løgmaður stúrir ikki

Hinvegin stúrir løgmaður ikki fyri, at óvirkaður fiskur fer at floyma av landinum fyri tað um forboðið fyri at avreiða uttanlands, verður tikið av.

Og tí heldur hann ikki, at fakfeløgini eiga at taka hetta so illa upp.

- Eru føroyskir fiskakeyparar nøkunlunda kappingarførir, eru teir altíð førir fyri at bjóða ein prís, sum setir kappingina frá keyparum uttanlands, til viks.

Løgmaður sigur, at skal útlendskur keypari verða kappingarførur, skal prísurin vera rættiliga nógv hægri uttanlands, tí fyri at sigla uttanlands við fiskinum krevst nógv sigling og tað er dýrt við teimum oljuprísum, sum nú eru. Og samstundis missa skipini fiskitíð.

Løgmaður sigur, sostatt dugir hann ikki at síggja annað enn at føroyskir keyparar altíð hava ein kappingarfyrimun framum útlendskar keyparar og tí ivast hann ikki í, at føroysku virkini altíð fara at fáa tann fisk, tey hava brúk fyri.

- Tí eri eg ikki bangin fyri, at hetta fer at seta okkum í sama bás sum ávís menningarlond, ið bara útflyta rávøru.

- So leingi, vit hava eina skynsama vinnu, fer hon altíð at megna at bjóða upp á fiskin.

Samstundis vísir løgmaður á, at forboðið ímóti at avreiða uttanlands er als ongin trygd fyri, at fiskur ikki fer óvirkaður av landinum.

- Í ávísum tíðarskeiðum hevur tað ikki verið óvanligt, at fiskur verður avreiddur um føroyskan bryggjukant, men verður bara kúvendur á bryggjuni umborð á farmaskip og sigldur uttanlands.

- Tí er skipanin sum nú er, ongin trygd fyri, at allur fiskur verður virkaður í Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hinvegin heldur hann, at hava vit gjørt upp við okkum sjálvi, at vinnan skal hvíla á marknaðarkreftirnar, mugu vit lata tær sleppa at virka og ikki leggja vinnuni forðingar í vegin.

Men er vánaligi fiskiskapurin ikki ein avleiðing av, at politiski myndugleikin ikki hevur megnað at stýrt fiskivinnuni við neyðugu stovnsrøktini.

- Tað mugu vit taka á okkum, staðfestir Jóannes Eidesgaard.

Men hann sigur samstundis, at samgongan hevur sett sær fyri at taka størri atlit at fiskifrøðini, hvat í stovnsrøkt umræður.